# Viðmerking um ferðina hjá Johannu

**Ivan Niclasen**
*Sjónvarp Føroya*



Í einum longum lesarabrævi gevur Dennis Holm lesarunum ta fatan, at m.a. Sjónvarp Føroya als ongan áhugað hevur í ferðini hjá sluppuni Johannu til Íslands og Skotlands. Hetta er ikki rætt. Ferðin hjá Johannu varir í umleið 14 dagar. Tá tað gjørdist okkum greitt, at tað ikki lá fyri at senda reportara og fotograf við á ferðini - ið annars ikki var ókeypis - tóku vit samband upp við íslendska sjónvarpsliðið, sum skuldi við á ferðina. Í samstarvi við teir vænta vit sostatt í komandi vetrarskrá at hava frásøgn frá ferðini.

Hesin møguleiki varð eisini umrøddur við fyriskiparnar stutt áðrenn Johanna fór úr Vági.

Viðvíkjandi raðfestingum annars, so eru júst søguligar hendingar og ferðir sum henda vanliga høgt raðfestar í føroysku loftmiðlunum. Hvørt mansbarn veit, at tað eru gjørdar óteljandi sendingar um annan veraldarbardaga og siglingina í tí sambandi. So leingi søgur eru at siga frá hesum tíðarskeiði eigur tað eisini at vera so. Í so máta man ferðin hjá Johannu eisini fáa sítt pláss í loftmiðlunum.

Sum Dennis Holm vísur á, so er ein slík søga positiv fyri Suðuroynna. Og tí skal hon eisini lýsast.

Á sama hátt sum fleiri beinleiðis sendingar í vár góvu eina heldur meira fjølbroytta og jaliga mynd av Suðuroynni. Hesa uppgávu fara vit sum fjølmiðil sjálvsagt framhaldandi at røkja. Tað eigur í hvussu er ikki at vera so øgiliga langt til Suðriar!

Hví bróta niður arbeiðið hjá øðrum á fólkatingi, Anfinn?

# Opið bræv til Anfinn Kallsberg

**Høgni Hoydal**



Góði Anfinn Kallsberg

Eg var sjálvur millum teirra, sum sóu úrslitið av fólkatingsvalinum í februar sum eina styrki fyri fullveldisvongin í føroyskum politikki.

Eg helt, at valstríðið til fólkatingsvalið vísti møguleikar fyri eini breiðari semju ímillum flestu flokkar í Føroyum.

Millum annað segði tú í valstríðnum til fólkatingsvalið fyri bara fýra mánaðum síðani, at tú og Fólkaflokkurin fóru ongantíð at góðtaka at vera avmarkað undir donsku grundlógini. Tit vildu, at vit skuldu yvirtaka alt, sum Danmark legði til ES. Og tit fóru ikki at góðtaka donsku lógaruppskotini um yvirtøkur og uttanríkisheimildir, sum tey lógu. Fólkaflokkurin lýsti enntá við, at vit vóru fullspottað, um vit góðtóku at verða rópt "Kongeriget Danmark for så vidt angår Færøerne".

**Samstarv afturvíst**

Eg vónaði tí, at vit sluppu undan somu støðu sum var í seinasta valskeiði, har fyrst Tórbjørn Jacobsen og síðani undirritaði førdu onnur sjónarmið fram enn Lisbeth L. Petersen í flestu málum, og at føroysku umboðini tískil tosaðu hvør ímóti øðrum. (Lisbeth hevði tó eina greiða støðu áðrenn og eftir valið, og tí havi eg virðing fyri).

Men eg fór skeivur.

Vit bjóðaðu tær uppí Norðuratlantsbólkin, men tú valdi heldur at gera tekniskt samstarv við Konservativa Fólkaflokkin í Danmark. Norðuratlantsbólkurin hevur tó roynt at boðið tær við til tiltøk og annað politiskt arbeiði, sum vit arbeiða við dagliga.

**Bert stuðlað stjórnini**

Eg havi bert sæð teg 4 ferðir á fólkatingi hesar 4 mánaðirnar síðani valið. Og hvørja ferð hevur tú ført heilt onnur sjónarmið fram, enn tey, sum tú førdi fram í valstríðnum.

Tú hevur tikið undir við donsku uppskotunum um yvirtøkur og uttanríkismál, har ein donsk hjálandafatan verður staðfest, ið hoyrir heima í amtstíðini, og tú hevur enntá takkað stjórnini fyri sína støðu.

Hetta hevur verið harmiligt at uppliva. Stjórnin hevur beinleiðis brúkt tínar útsagnir til at afturvísa tí, sum eg havi ført fram, og til at vísa á, at føroyingar ynskja ikki fullveldi. Harvið hevur stjórnin aftur kunnað víst á split og ósemjur millum føroyingar.

**Skjýtur arbeiðið hjá øðrum niður**

Men tað var ovboðið, tá tú møtti á fólkatingi mikudagin 1. juni 2005.

Norðuratlantsbólkurin hevur lagt stóra arbeiðsorku í at fáa eitt aðalorðaskifti um ES-grundlógina og eina samtykt um, at ein óheft kanning skal lýsa, hvørjar avleiðingarnar av hesi lóg verða fyri Føroyar og Grønland. Lógaruppskotið um ES-grundlógina fær jú 2. viðgerð 8. juni. Og vit høvdu fyrireikað alt væl og virðiliga, m.a. við fundum við allar flokkar á fólkatingi.

Tað sá eisini út til, at vit kundu fáa meiriluta fyri uppskotinum, hóast teir báðir stjórnarflokkarnir vóru ímóti.

Men tú fórt á røðarapallin og gekk ímóti okkara uppskoti. M.a. bar tú fram tey ósannindi, at Føroya Landsstýrið ikki tók undir við uppskotinum.

Hetta brúkti stjórnin beinavegin til aftur at vísa á ósemjur millum føroyingar - og í hesum føri eisini til at vísa á ósemjur millum føroyingar og grønlendingar. Danski uttanríkisráðharrin brúkti beinleiðis tína støðu sum grundgeving fyri at ganga ímóti eini kanning.

**Fráboðað fyri mánaðum síðani**

Tú vildi eisini vera við, at tú ikki var kunnaður um uppskotið.

Hetta veitst tú eisini er ósatt.

Vit boðaðu frá ynskjunum um eina óhefta kanning, tá Fólkatingið hevði fyrstu viðgerð av ES-grundlógini í apríl mánað. Tá vart tú ikki á Christiansborg, men uppskot okkara hevur ligið á fólkatingi í tveir mánaðir og er sent øllum limum.

Eg havi eisini sjálvur tosað við teg um uppskotið heima í Føroyum og havi staðiliga biðið teg møta upp til tess at stuðla í orðaskiftinum. Eisini havi eg boðað frá tí í sambandi við fyrispurningar á Løgtingi, og eg havi eisini heitt á landsstýrið um at kanna allar avleiðingar nærri.

Um tú hevði viljað havt eina øðrvísi kanning, so kundi tú sjálvur tikið stig til tað. Men tað hevur tú ikki gjørt. Og vildi tú havt landsstýrið og føroyska serfrøði uppí, so kundi tú sett teg í samband við Norðuratlantsbólkin, og so kundu vit tillagað uppskotið sambært tínum ynskjum. Men tað gjørdi tú heldur ikki.

Uttan ávarðing legðist tú í staðin eftir tí stóra arbeiði, ið Norðuratlantsbólkurin hevur gjørt í hesum máli.

Eg haldi hetta vera ómetaliga illoyalt og púra óskiljandi.

**Hvat gera vit á fólkatingi?**

Kundi hugsað mær at vita, hví tú gongur ímóti hesum sjálvsagda uppskoti um eina óhefta kanning. Er tað ikki okkara skylda sum føroysk fólkatingsumboð at syrgja fyri, at avleiðingarnar fyri Føroyar verða lýstar, áðrenn tað fólkating, vit eru partur av, samtykkir løggávu, ið fær stórar avleiðingar fyri okkum? Og er tað so løgið at fólkatingið samtykkir at kanna avleiðingarnar, tá tað jú er fólkatingið, ið skal gera samtyktina um ES-grundlógina?

Eg kundi hugsað mær eina frágreiðing frá tær, hví tú hevur valt at fara soleiðis fram, sum tú hevur. Hvørjum skal tað gagna?

Hví hevur tú kúvent so nógv í mun til tað, sum tú segði undan fólkatingsvalinum? Og hóast tú ikki vilt verða partur av Norðuratlantsbólkinum, hví er so neyðugt at standa á tingsins røðarapalli og bera fram ósannindi um okkara arbeiði og ganga ímóti tí?

Hvør heldur tú, tá til stykkis kemur, fær fyrimun av, at uppskotið fall? Er tað til fyrimunar fyri Føroyar, at eingin kanning verður? Ella er tað kanska mest til fyrimunar fyri donsku stjórnina?

At ES-grundlógin nú helst ikki kemur í gildi í verandi líki, er kanska heppið fyri Føroyar. Men tað ger tað ikki minni neyðugt, at vit fáa lýst allar avleiðingar, áðrenn Fólkatingið samtykkir ES-grundlógina.

Eg og Norðuratlantsbólkurin eru altíð at fáa fatur á, um tú hevur nakað at siga okkum, so vit sleppa undan at viðgera ósemjur á fólkatingsins røðarapalli.

Við vón um hetta verður framferðarhátturin framyvir - og við vón um skjótt svar.

# Yo-yo-fundir í býráðnum

**Beate L. Samuelsen**
*Býráðslimur í Havn*



Eykabýráðsfundurin í Tórshavnar býráð hósdagin 9. juni er fluttur aftur og fram frá einum degi til tann næsta og í einum hurlivasa av fleiri ymiskum klokkutíðum

Fyri skjótt hálvum ári síðani, vóru dagarnir fyri føstu fundirnar í Tórshavnar býráð ásettir.

Um nakað serliga átrokandi mál skal fyri býráðið, og mett verður, at ov leingi er at bíða til næsta fund, kann borgarstjórin kalla inn til eyka býráðsfund.

Tað er eisini í fínasta lagi. Eingin hevur nakað ímóti tí.

Týsdagin í hesi vikuni vóru send út boð um opnan eykabýráðsfund at fara fram mikudagin 8. juni kl. 18.15.

Trý mál vóru sett á skrá: Setan av miðfyrisitingarstjóra, byggiskrá og betran av hølum í Argja skúla og jattan um 700.000 kr. til at gera uttanumøkið liðugt við nýggja skúlan í Kongagøtu.

Nú var tað so, at mikudagurin 8. juni var sami dagur, sum fótbóltsdysturin millum Føroyar og Írland var settur at vera. Klokkutíðin kom tí at gerast í so knøpp, tá býráðslimir bæði skuldu á eykabýráðsfund, varpa dystin út og skunda sær niðan á Tórsvøll at hyggja at dystinum.

Hetta fekk ilt í onkrar av limunum.

So komu snarboð frá kommunustjóranum um telduna, at fundurin var fluttur til hósdagin 9. juni kl. 18.15.

Eftir hetta komu eini onnur snarboð í nýggjum telduposti frá kommunustjóranum, at eyka býráðsfundurin ikki skuldi verða kl. 18.15, men kl. 17.45 í staðin fyri.

Ná.

Men so kom Gud hjálpi mær aftur ein uppaftur nýggjari teldupostur frá sama avsendara, at nú skuldi fundurin verða kl. 17.00, seinni broytt til kl. 17.30 fyri aftur at verða broytt til kl. 17.00.

Eyka býráðsfundurin er ikki bara fluttur aftur og fram og tilbakar eins og leikan yo-yo óteljandi ferðir eftir tveimum døgum, men til hendan seinast ásetta fundin við klokkutíðini 17.00 (um hon ikki er broytt aftur í skrivandi løtu), er eisini fundarskráin broytt.

Í staðin fyri at snúgva seg um trý mál, er tað bert tað eina málið, sum skal viðgerast, nevniliga tað um setan av miðfyrisitingarstjóra.

At ein fundur verður fluttur, er tað eingin, ella fá, sum hava nakað ímóti.

At jonglera við so nógvum fundarboðum sum hesi, ið vit í Havn hava fingið eftir fáum tímum, er óhoyrt aðra staðni.

Men í høvuðsstaðnum í Føroyum ber alt til, folkens.

Fleiri av býráðslimunum hava verið noyddir at broyta aðrar týdningarmiklar avtalur, ið gjørdar eru í góðari trúgv og í góðari tíð fyri at sleppa undan at renna okkum í hendingar sum hesa.

Orsøkin til allar fram- og tilbakarflytingar av eykabýráðsfundinum liggur í trupulleikanum hjá býráðssamgonguni at fáa hana fullmannaða, eftir sum hon einans telur sjey móti okkum seks, sum eru í minnilutanum.

Um ikki liggur fyri hjá øllum býráðslimum í samgonguni í Tórshavnar býráð at koma á fund, ja, so skelvir onkur í brókunum.

# Pipar og Salt hósdagin

**Torstein T. Hansen**

Eg lesi í bløðunum at forsølan til **Pipar og Salt** byrjar hósdagin - tað er Pipar og Salt á listastevnuni okur tosa um. Hví er eingin forsøla í Suðuroy? Forsøla er í Havn og í Eysturoynni, men hvat við okkum sunnanfyri? Og hvat fáa okur at síggja til listastevnuna í Suðuroy? Mestsum alt sker norðanfyri. **Norðurlandahúsið** livir upp til navn sítt: **Norður-landahúsið.**